# Temadagur

**um epilepsi verður hildin á Hotel Hafnia:**

29. september 2006 kl. 9.30 – 15.30

við Bjarka á Rógvi Hansen og Joan Højgaard, neurologum.

**Skráin verður hendan:**
Fyrrapartin (2½ tíma við ½ tíma steðgi)

1. Hvat er epilepsi?
2. Hví fær ein epilepsi?
3. Hvør fær epilepsi?
4. Hvørji sløg av epileptiskum anføllum eru?
5. Hvussu verður ein kannaður fyri epilepsi?
6. Einaferð epilepsi, altíð epilepsi?

**Døgurðastøðgur ca. 1 tíma**

Seinnapartin (2½ tíma við ½ tíma steðgi)

7. Viðgerðarhættir ímóti epilepsi:
   a. medicinsk (serligir bólkar s.s.: kvinnur, børn og gomul)
   b. ikke-medicinsk viðgerð
   c. kirurgisk viðgerð
   d. alternativ viðgerð
   e. sosialt

Møguleiki verður at seta spurningar.

Hesin temadagur er ætlaður øllum, ið starvast við fólki, ið hava epilepsi, limum, fólki í sjúkrahúsverkinum, heimarøktini, skúlar, stuðlum undir stuðulsfólkaskipanini o.l., lærarum, pedagogum og annars øllum, ið hava áhuga í hesum fyrilestri.

Tilmelding fer fram á tlf.: 263078 (Randfríð Sørensen) og 219793 (Mari Johannesen), innan sunnukvøldið 24.09.2006 kl. 20.00. (Best um ringt verður eftir kl. 16.00).

Kostnaðurin fyri dagin er kr. 300,00 fyri hvønn luttakara og kann flytast á Postgiro nr. 70.548 ella Føroya Sparikassa nr. 174.413.7. Í prísinum er ein góður døgurði á Hotel Hafnia í døgurðasteðginum.

Epileptikarafelag Føroya

**Nevndin í Epileptikarafelagnum**

**Frá Sunda kommunu**

# Pedagogur/ Avloysari

## til Frítíðarskúlan í Hvalvík

Søkt verður eftir einum pedagogi at byrja 02.10.2006 ella eftir nærri avtalu, og eftir avloysara.

**Størvini at søkja eru:**
1 pedagog 30 t/v.
Sjúkra avloysara

Frítíðarskúlin liggur í hugnaligum, barnavinarligum umhvørvi, har tann vælkenda áin rennur, og ein nýggjur fótbóltsvøllur eisini er tætt við.

**Vit ynskja**

- At tú hevur hug at arbeiða við størri børnunum.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
- At tú hevur hug til at skapa og seta dám á okkara frítíðarskúla.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nancy Poulsen leiðara, á tlf. 772021 ella 422717.

Umsóknir við avritum av prógvi verða at senda til:

**Barnagarðin við Kráir**
Fo – 430 Hvalvík
e- mail: nosi@post.olivant.fo

**Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann 27. september 2006.**

**Verð við til nøkur spennandi kvøld um:**

## Hjúnalag og familjuviðurskifti



**Undirvísari:** *Steen Palmquist, familjuráðgevi og psykoterapeutur*

**Skrá:**

*25.09:* *Kærleiki lívið út.*
*23.10:* *Munur er – tíbetur!*
*20.11:* *Tað havi eg ongantíð sagt!*
*20.01.07:* *Kl. 15.00 til kl. 21.00*
*Kenn títt hjúnalag.*
*Menningartíðir í hjúnarlagnum.*
*Tá samskiftið verður til kreppu.*
*19.02:* *Smá børn í familjuni.*
*19.03:* *Tannáringar í familjuni.*
*16.04:* *Familjan – ein avbjóðing.*

*Kvøldini byrja kl. 20.00*
*og enda kl. 22.15.*

**Kostnaður:** 100 kr. fyri hvønn fyri kvøldið

**Nærri fæst at vita við at venda sær til:**

**Astu Joensen** asjo@lsh.fo tlf. 318969/269469 - ella

**Sólbjørg Símunarson**, tlf. 310899

**Stað:**
**Kirkju- og missiónshúsið**
**á Argjum**

# TOYOTA reservedele

Vi kan tilbyde Danmarks største udvalg i nye og brugte reservedele til Toyota.

**Vi sender fra dag til dag til Færøerne.**

DKAUTO.DK
AUTOGENBRUG - SPECIALE TOYOTA
Flensborgvej 340 - 6200 Aabenraa
tlf. +45 7461 4110 - fax +45 7461 4164
email: salg@dkauto.dk - www.dkauto.dk

Forhenværende
Aabenraa Autogenbrug

ISO 9001 certificeret

DAG Dansk Autogenbrug - vi skåner miljø og økonomi

Autophuggernes DATALAGER DK

# Adressur í Hvalbiar kommunu

Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur, er adressuskráin fyri **Sandvík** og **Hvalba** í Hvalbiar kommunu góðkend.

Skráin er almenn og tøk á www.matrikul.fo

**Landsadressuskráin**
Boks 327 · Tlf. 357900 · Fax 357901
FO-110 Tórshavn
www.matrikul.fo – post@matrikul.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Sølufólk til Hvítvørudeildina á Hjalla

Vit sóknast eftir einum sølufólki til Vøruhúsið á Hjalla, at byrja skjótast tilber.

Talan er um tað nýggju Hvítvørudeildina. Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv, við nógvum dagligum avbjóðingum.

Arbeiðið umfatar m.a. avgreiðslu av kundum, daglig røkt av handlinum og innkeyp.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, tænastusinnaður, ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir ella útbúgving innan handilsvinnu, men hetta er ikki ein treyt.

Meira fæst at vita við at venda sær til Birgir, tlf. 342500.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast hósdagin tann 21. september 2006 og skal sendast til:

LITAVAL P/F

Box 1019 · 110 Tórshavn
att: Birgir
e-mail: bav@litaval.fo